# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Vágsbotnur sum savnandi miðdepil

Føroyingar, sum ferðast í útlondum, koma oftani heimaftur við eini kenslu av, at vit í Føroyum eru eftirbátar, tá tað snýr seg um at troyta møguleikar í okkara egna heimliga umhvørvi at skapa umstøður fyri eitt nú hugnaligari sosialari samveru. Flestu av okkum, sum hava vitjað eitt nú í Bergen ella í Stavanger, ella fyri tað í Keypmannahavn, fyri bert at taka nøkur dømi, hava upplivað, hvussu myndugleikarnir har saman við handilslívinum hava megnað at skapa hugnalig og savnandi umhvørvi fyri bæði egnu íbúgvar sínar og ikki minst fyri mongu ferðafólkini.

Herfyri varð orðaskifti um miðbýin í høvuðsstaðnum, har víst varð á, at vit megna ikki at skapa ein livandi og dragandi miðbý í Havnini. Nú eru so tekin um eina broyting til tað betra. Ikki í sjálvum miðbýnum men rundan um Vágsbotn og Tórsgøtu, ið vit so aftur kunnu meta sum ein meginlívæðr í miðbýarhjartanum. Her eru myndugleikar og handilslív farin í gongd við at skapa eitt meira livandi og hugnaligt umhvørvi. Vit hóma eina byrjandi tilgongd, sum, um ikki júst í vavi men so kortini í skapi minnir eitt sindur um savnandi pláss kring havnirnar í stórbýum kring okkum.

Roynt verður at menna torgið rundan um Nólsoyar Páll við eitt nú at minka um ferðsluna og seta upp benkur. Myndugleikarnir hava síðani skapt eitt umhvørvi við keikantin, har tað ber til hjá útróðrarmonnum og øðrum at selja sínar vørur í einum reinum og nosligum umhvørvi og undir taki. Og leita vit so inn móti aldargomlu, serstøku og vøkru bygningunum á Bryggjubakka síggja vit eina byrjan til eitt tiltrongt caféumhvørvi, har bæði føroyingar og fremmandafólk kunnu sessast og hittast – har høvi er at fáa kaffi og øl og onkran bita eisini. Spurningurin er nú, um hesir fyrstu spírarnir til eitt hugnaligt og fólksligt umhvørvi í Vágsbotni sleppa at blóma og eisini geva íblástur til onnur eisini at sáa. Her eru nógvir møguleikar, spurningurin er um vilja og dirvi hjá bæði privatum og almennum myndugleikum. Slepst til hølini undir Bryggjubakka, so kann nógv gerast. Leita vit so niðan í Tórsgøtu, so hava vit har fingið eitt spildurnýtt spælistað í gamla Vaskaríinum, eisini ein týðandi brikkur í at menna ikki bert Vágsbotn men alt umhvørvi í grannalagnum.

Miðlahúsið við sínum serstaka umhvørvi og miðlum kennir seg sum ein part av hesi menning og vit fara eisini eftir førimuni at gera okkara til, at hesin so vakri og serstaki parturin av høvuðsstaðnum og Føroyum fer at gerast enn meira livandi og fólksligur.

Vit skulu heldur ikki gloyma týdningin av einum altjóða umhørvi í Vágsbotni, har fremmandir siglarar úr øllum herðashornum leggja at og har spennandi fólk koma í land og á savningarstøðunum her koma í prát við føroyingar. At skapa eitt altjóða og fólksligt umhvørvi her inni í krókinum í Vágsbotni er einki minni enn ein gimsteinur. Latið okkum hjúkla um hann.

**Sosialurin**

# Heimspremiera í Gøtu Kirkju

**TRÓNDARDAGAR**
*Tíðindaskriv*



Tað er ikki á hvørjum degi at vit hava ein internationala frumframførslu í Føroyum. Men leygardagin 12. Juli kl. 17 kunnu vit fáa hesa forkunnugu uppliving, tí tá verðurtónleikaverkiðTrónd-ur í Gøtu frumframført í Gøtu Kirkju. Verkið er skrivað fyri kamarorkestur, kór og solistar, og tað er heimskendi Gavin Bryars ið hevur skrivað tónleikin.

Luttakararnir á konsertini eru Aldubáran, Rúni Brattaberg, Eivør Pálsdóttir og Eystanljóð, meðan Gavin Bryars dirigerar sjálvur.

Tónleikurin er bygdur á eitt úrval av tekstum, ið er skrivaðir um Trónd í Gøtu, men verkið er eisini tíðiliga inspirerað av St. Brendan, og inniheldur fleiri tekstir um hann. Føroysku tekstirnir er allir uttan kredda Tróndar skrivaðir av Djurhuus monnunum.

Fyri hundrað árum síðani undraðist Símun av Skarði á, at eingin standmynd var reist av Tróndi. Tað skuldu ganga neyvt 100 ár, áðrenn hendan undran bleiv svarað. Fyri einum ári síðani kom rættuliga glið á arbeiðið við at gera standmynd av Tróndi, og 12. Juli 2008 bleiv kosin at vera at verða dagurin, tá føroyingar loksins fingu standmynd av Tróndi í Gøtu reista og tað er í hesum sambandi at verkið verður framført.

Allatíðina hevur verið ætlanin, at dagurin skuldi verða nakað heilt serligt, og hugsað var bæði væl og leingi, hvussu hetta skuldi fremjast. Tá ein av høvuðsmonnunum handan standmyndina Árant Hansen í Norðragøtu á Ólavsøku í fjør møtti Rúna Brattaberg í Havnargøtum fullu brikkarnir uppá pláss.

Hugskotsríki Rúni skeyt upp at skriva eitt verk um Trónd í Gøtu, ið skuldi frumframførast, tá standmyndin varð avdúkað. Rúni hevði sjálvur fyri nøkrum árum síðan fingið skrivað eitt verk um Egil Skallagrímsson, og var áhugaður at fáa skrivað eitt verk aftur-at um Trónd í Gøtu.

Heitt varð á Gavin Bryars, ið eisini hevði skrivað verkið um Egil Skallagrímsson, um at skriva verkið, og var hann sera spentur beinanvegin.

Ikki er altíð so langt frá hugskoti til verunleika, leygardagin kunnu vit sessast í Gøtu Kirkju og heysta ávøkst frá einum tokutum ólavsøkuhugskoti. Vit kunnu uppliva nøkur av okkara bestu tónlistafólkum á einum og sama palli býta út av sínum gávum, vit fara at uppliva eitt samstarv ímillum yrkistónlist og áhugatónlist. Føroyski og altjóða tónleikaheimurin hittist og siðbundna søgan og mergjaðu orðini verða latin í nýggjar og nútímans tónar.

Nei, Tróndur gamli hevur ivaleyst ikki vent sær í grøvini fyri seinastu ferð.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.